## Europameistara vitja

Hósdagin komu donsku europameistararnir í kvinnuhondbólti fyri U18-landslið til Føroya. Liðið skal spæla tríggjar venjingardystir á ferðini, og eru dystirnir liður í føroysku fyrireikingunum til Challenge Trophy. Leygardagin klokkan 16 verður spælt móti føroyska kvinnulandsliðnum í Hoyvíkarhøllini. Sunnudagin klokkan 13.30 verður spælt í Vestmanna móri føroyska U21-landsliðnum, og mánadagin klokkan 19 verður spælt í Klaksvík móti nýkosnu steypavinnarunum úr Stjørnuni.



## Fótbóltsvenjarar fundast

Felagið fyri føroyskar fótbóltsvenjarar hevur aðalfund og venjaradag leygardagin 27. februar. Dagurin verður hildin í Klaksvík, og har fara U21-venjararnir at greiða frá teirra arbeiði við U21-landsliðnum, sum hevur fingið frálík úrslit í EM-undankappignini. Sjálvur aðalfundurin byrjar klokkan 13, og um kvøldið verður felags hugnaløta, skrivar felagið á heimasíðu sínari, vff.fo.

# Steypavinnarar í yngru

**Allan sunnudagin á tamb spældu yngru hondbóltsdeildirnar steypafinalu í Ítróttarhøllini á Hálsi**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk


Høllin var sær sjálvum lík frá finaluni við eyðkenda gula gólvinum, soleiðis at umstøðurnar at spæla hondbólt vóru av teimum allarbestu.

Og eisini karmarnir sjálvir vóru framúr. Var rómurin nógvur leygardagin, so var hann tað so sanniliga eisini sunnudagin, tá hópur av foreldrum og øðrum áhugaðum eggjaðu sínum liði vegin fram í finaluni.

Og hóast tað nú einaferð skuldi verða so, at nøkur vunnu, meðan onnur taptu, so var tað fyrst og fremst stuttleikin kring hondbóltsspælið, sum var vinnarin á degnum, har yngru spælararnir í ein dag sluppu at royna seg á vakrasta hondbóltspallinum í landinum.

Og so slepst illa undan at nevna finaludystin hjá dreingjum 12, har VÍF at enda knógvaði H71 í einum sonnum gysarar. Tveir umdystir og brotskastskapping skuldi til, áðrenn VÍF kundi rópa seg vinnara av dystinum. Á vegnum upplivdu teir millum annað, at hoyvíkingar í umdystinum vóru á odda við fýra málum, men tað eydnaðist kortini vestmenningunum at stríða seg upp á javnleikin, og so vóru teir gulu altso nóg kaldir, tá brotskøstini skuldu takast.



**Dreingir 17, Kyndil**
**Standandi: Rógvi Dal-Christiansen, Hjalte Bachmann, Tróndur Jensen, Jóhan á Plógv, Oyvind Lutzen og Ludvík Súnason. Húkandi: Hjalmar Klein Olsen, venjari, Pál M. Joensen, Rúni Johannesen, Høgni Klein Olsen, Jan Pauli Johannesen, Jógvan S. Nolsøe, Rúni Danielsen og Eirikur Simonsen.**



**Dreingir 14, VÍF**
**Standandi: John Rúnason, Magnus Durhuus í Niðristovu, Hanus Christophersen, Áki Egilsnes, Jóhan Petur í Niðristovu, Julian Olsen og Erla Olsen, venjari. Húkandi eru: Ingi Olsen, venjari, John Kári Vang, Rói Olsen, Thorstein Brattaberg, Tóki Seloy, Sjúrður Olsen, Bjarni Bláhamar og Brynhild Seloy, venjari.**



**Gentur 17, Kyndil**
**Standandi: Ásleyg Súnadóttir, Anna Sofía Hjalt Mohr, Turið Arge Samuelsen, Rannvá Carlsen, Anna Brimnes, Annika Sigurðsdóttir, Marin Eidesgaard og Ester Petersen. Húkandi eru: Sára Sondum, Gunn Hentze, Kristina Brekkstein, Guðrið Geirsdóttir Eystberg, Sissal Svabo Samuelsen, Birita Mortansdóttir, Eyðbjørt Midjord og Geir Wardum, venjari.**



**Gentur 10, Neistin**
**Margit Weihe Frímundsdóttir, Sólvá Bech Árting, Katarina Høj, Íðunn Mortensen, Gudrun Olsen, Drós Ragnarsdóttir, Annika Clementsen, Gunnfríð Pállsdóttir Nólsoy, Elisa Kvilt Lindberg, Rannvá Dahl Hanusson, Dania Durhuus, Lý Holm Mortensen, Fríða á Dunga og Jákup Hanusson, venjari.**

## Úrslitini

| | | |
|---|---|---|
| Gentur 10 | StÍF-Neistin a | 1-4 (0-1) |
| Dreingir 10 | H71-StÍF | 7-4 (4-2) |
| Gentur 12 | Kyndil-Neistin | 13-6 (9-1) |
| Dreingir 12 | Kyndil-Tjaldur | 18-9 (8-5) |
| Gentur 14 | Neistin-Kyndil | 9-13 (5-6) |
| Dreingir 14 | H71-VÍF | 24-27 *eftir umdyst og brotskastskapping 24-24 (16-16(6-8))* |
| Gentur 17 | H71-Kyndil | 8-25 (3-13) |
| Dreingir 17 | H71-Kyndil | 21-23 (9-17) |

